## Jørgen boðin á almenna vitjan í Íslandi

Uttanríkisráðrri Íslands, Ingibjörg Sólrún Gísladóttir, hevur boðið Jørgeni Niclasen við frú á almenna vitjan. Uttanríkisráðharrarnir fara at umrøða mál av týdningi fyri báðar partar. Við hesi vitjan verður góða samstarvið landanna millum enn einaferð styrkt. Vitjanin verður í døgunum 17.-19. november 2008, skrivar uttanríkismálaráðið á hemasíðu síni

## Jákup Símun dró longra stráið

Fínteljingin eftir kommunuvalið í Tórshavnar kommunu týsdagin flutti tvær atkvøður, ið gjørdi kappingina millum tvey valevni á lista E enn meiri spennandi. Valkvøldið vóru tríggjar atkvøður á muni millum Jákup Símun Simonsen og Hildur Eyðunsdóttir á lista E. Fínteljingin staðfesti, at bert ein atkvøða skilir valevnini hjá Tjóðveldi til kommunuvalið. Jákup Símun Simonsen fekk 237 atkvøður og Hildur Eyðunsdóttir 236. Fínteljingin í Tórshavnar kommunu flutti sostatt einki valevni. Tøl og tilfar frá kommuvalinum eru til skjals á heimasíðu býráðsins www.torshavn.fo.





# Alneyðugt við umboðan í Moskva



*Jørgen Niclasen ætlar sær at arbeiða hart fyri at fáa føroyska sendistovu í Russlandi á fíggjarlógina fyri komandi ár*

**- Føroyski útflutningurin til Russland er seksfaldaður seinastu fýra árini, og hóast talan framvegis er um smá tøl, so er tendensurin greiður og vísir, hvussu stórt potentiali er í russiska marknaðinum, sigur Jørgen Niclasen, uttanríkismálaráðharri**

SENDISTOVA

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Undanfarna CHE-samgonga hevði ætlanir um at seta á stovn sendistovu í New York, hóast talan var um eina vinstravenda samgongu. Tí kundi tað í fyrstu syftu undra, at nýggja og í høvuðsheitinum høgravenda ABC-samgongan feldi í samgonguskjalið, at sendistova skuldi setast á stovn í Moskva.

Men týdningurin av einari sendistovu har er evidentligur nú, tá russar hava boykottað innflutning av føroyskum fiskavørum.

- Vit arbeiða við málinum um eina føroyska sendistovu í Moskva, men pengar eru ikki sum er settir av í fíggjarlógar uppskotinum fyri næsta ár, sigur Jørgen Niclasen, uttanríkismálaráðharri.

Ein sendistova í Russlandi kostar 3,5 milliónir krónur um árið, og sum skilst fer uttanríkismálaráðharrin at gera eina roynd at fáa upphæddina á fíggjarlógina longu fyri komandi ár.

- Eydnast hetta ikki, so má eg royna alternativar møguleikar, tí tað er umráðandi at hava umboð í Russlandi sum skjótast, sigur Jørgen Nicasen.

### Potentiellur risamarknaður

Hagtølini vísa, at útflutningurin av føroyskum fiskavørum til Russlands er seksfaldaður seinastu fýra árini, og hóast talið er vaksið frá einum lítlum tali til eitt framvegis lítið tal, so vísa hagtølini kortini, hvussu risastórur hesin marknaður kann gerast.

- Og so løgið tað kanska kann ljóða, so er russiski marknaðurin ein vælgjaldandi marknaður, sigur Jørgen Niclasen.

Hetta kemst sjálvandi av, at russiski búskapurin er vorðin meiri opin eftir at kommunisman fall, og hetta hevur ført við sær eina yvirflóð av innflutningi.

- Tað er kanska júst hetta, at innflutningurin er vaksin so ógvusliga, sum ger, at russar nú royna at bremsa honum, sigur Jørgen Niclasen.

Men júst tí, at russiski marknaðurin letur upp fyri næstan óavmarkaðum møguleikum ger, at uttanríkismálaráðharrin vil gera sítt ítarsta at vit fáa umboðan har, so ella so.

### Donsk loysn ikki góð

Vil løgtingið undir viðgerðini av fíggjarlógini fyri komandi ár ikki játta pening til eina sendistovu í Moskva, so fer uttanríkismálaráðharrin at arbeiða við alternativum loysnum. Og ein teirra er, at vit fáa donsku sendistovuna í Moskva at umboða okkum.

- Men hetta er neyvan nøkur góð loysn. Støðan er í dag, at danir kunnu senda laks á russiska marknaðin, meðan vit ikki kunnu. Tað merkir, at skulu vit sleppa inn á russiska marknaðin í løtuni, er einasti møguleiki, at selja til danir, sigur Jørgen Niclasen.

Hann ivast ikki í, at danir vilja hjálpa okkum í støðuni, vit eru í, men hann loyvir sær at ivast í, hvussu høgt teir fara at raðfesta hesa hjálpina, tí hon gongur beinleiðis ímóti áhugamálunum hjá donsku vinnuni.

- Tí er tað so umráðandi, at vit fáa okkara egna sendimann í Moskva, sigur Jørgen Niclasen.

### Yvirtaka frá VMR

Hann hevur higartil hildið seg kyrran, tí tað hevur verið Vinnumálaráðið, sum hevur arbeitt við málinum. Hann heldur tað ikki vera rætt, at fleiri ráð vøsa í málinum í senn. Hinvegin heldur hann spurningin vera, um tað ikki nú er rætt hjá uttanríkismálaráðnum at taka yvir nú.

- Eg havi skilt, at russar koma á vitjan aftur í februar at kanna støðuna, og vit mugu vóna, at niðurstøðan hjá teimum tá verður meiri positiv. Men vit mugu á ongan hátt undirmeta virðið av einari sendistovu í Moskva kortini, sigur Jørgen Niclasen.

Hann vísir á, at tá tú virkar á altjóða marknaðinum, er tað sera umráðandi at hava umboðan á staðnum.

- Tað er eisini orsøkin til, at londini eru so íðin at seta á stovn sendistovur hjá hvørjum øðrum. Tað ræður um at hava fingurin á pulsinum alla tíðina, sigur Jørgen Niclasen.

Hann setur tí spurnartekin við, um tíðin ikki er komin til, at uttanríkismálaráðið yvirtekur málið frá vinnumálaráðnum.

- Eg havi alternativar møguleikar at arbeiða við, um løgtingið ikki vil seta føroyska sendistovu í Russlandi á fíggjarlógina fyri komandi ár, sigur Jørgen Niclasen, uttan tó at koma nærri inn á, hvørjir hesir møguleikar eru.